# VEÐRIÐ Á HELLUNUM



# JANUAR 2025

# VEÐURSTOVA FØROYA

**Dagfesting**: 30. januar 2025

**Staður**: Rættarvegur 1 – 695 Hellurnar

**Heimildarfólk:** Símun Hans Jacobesn

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Veðrið í bygdini

Hellurnar er bygd innarliga á sunnara armi á Oyndarfirði.

Fjørður er opin í landnyrðing. Beint eystan fyri fjørðin eru Djúpini, og hinumegin eru fyrst Kalsoy og so næstan allar hinar Norðoyggjarnar. Hetta hevur við sær, at eysturættin er sera góð og turr á Hellunum, tí at lotið skal upp um nógv og høgfjøll, áðrenn tað er á fjørðinum ella í bygdini.

Eystan- og sunnanfyri er fjallarøð, sum gongur úr Nestanga og suður til Heltnina – brotin av av tveimum dalum. Roknað úr eystri og vestureftir er Rustin, har sum Altarið er hægst (483m), so ein dalur, Flatirnar, so Slætnatindur (625m) og innan fyri hann er Hjarðdalur. Hendan fjallarøð gevur lívd, tá ið lítil vindur er, men er nakað av vindi – ella illveður – er vindurin nógvur og ójavnur.

Norðan fyri bygdin er fjøðurin – Oyndarfjørður. Hann er ein góðan kilometur breiður á miðjuni og 2½ km djúpur. Norðan fyri fjørðin eru fjøll, sum verja ímóti høgættini. Tey eru Oyndfjarðarfjall (421m) har norðuri, síðan Tindur (503m). Síðani kemur bygdin Oyndarfjørður, har sum ein drúgvur dalur og eitt skarð eru vestanfyri. Tá ið lotið kemur úr Skarðinum, er kann bæði vera nógvur vindur á Hellunum og mjørki.

Innan fyri Oyndarfjarðarbygd er ein brøtt fjallarøð. Byrjandi í norðara enda er Knúkur, og so er røðin hægri inneftir. Innast er Vaðhorn (727m). Hendan røðin órógvar luftrákið av høgum útsynningi upp ímóti útnyrðingi, og tí eru ættirnar millum tær keðiligar við ójavnum vindi.




*Mynd 1: Eysturpartur av Eysturoy. Pílarnir peika ímóti Hellunum.*

Fyri at fáa greiði á, hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum á Hellunum, setti undirritaði seg í samband við Símin Hans Jacobsen. Hann er ættaður úr Uppi í Húsi av Syðradali í Kalsoynni, men

giftist til Hellurnar í 1959. Hann var sjómaður á undum árum – var við fiskiskipum sum dekkari og motorpassari í 15 ár. Hann legðist upp á land í 1968 eftir at vegurin var komin til Hellurnar, arbeiddi í byggivinnuni í 5 ár, áðrenn hann fór á Skála Skipasmiðju. Tað gjørdist lívsstarv hansara – var har í 28 ár. Í bygdini hevur hann fingist við nógv við seyð – ognarmaður – og hevur verið røktingarmaður í eitt mannaminni í Skarðhaga. Hann beyð mær at vitja seg á Hellunum at gera samrøðu um veðrið.

Við til samrøðuna, sum var á Rættarvegi Ovaravegi 1 á Hellunum hevði eg spurnarblað til 16 ættir – tær 4 høvuðsættirnar og hálvættirnar umframt tær 8 millumættirnar:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan liggur kemur suður ígjøgnum Djúpini og inn á fjørðin ímóti bygdini.




Norðurættin roynist illa í ringum veðri. Hann kemur í Rustarkambin og slær oman yvir ta ytru bygdina. Har frammi í bygdini kemur hann beint á. Vindurin er ójavnur, og í illveðri eru hvirlurnar sera harðar. Í góðveðri roynist norðan væl, kyrt á fjørðinum og millum hús, tó at vindurin eisini er eitt sindur ójavnur tá.

Tá ið nakað av vindi var, ella illveður av norði, fóru teir til útróðrar á Norðhavið, tí teir vistu, at veðrið batnaði, so hvørt sum teir komu norðureftir.

Norðan er ikki góð terraætt á Hellunum. Hann kemur av havinum, og lotið er ráðligt. Tí tornar ikki, tá ið hann kemur høgt, heldur ikki í góðum veðri. Hetta er ikki ringasta ættin til regn. Norðan leggur nakað av kava á Hellunum, men er ikki ringasta kavaættin – tað eru eysturættirnar.

Eitt sindur av brimi er á norðurætt. Tað kann súga nakað, tó ikki tað nógva.

Norðan er ikki mjørkaætt á Hellunum.

## Landnyrðingur norðan

Tá ið ættin er landnyrðingur norðan, líkist veðrið veðrinum á landnyrðingi.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur kemur undan Stongini og kemur javnur inn á fjørðin.




Tá ið hann er landnyrðingur, er vindurin javnur. Í illveðri eru tey ikki bangin fyri ættini, tí hann er so javnur – eisini tá ið regn ella kavi eru uppií. Í góðum veðri roynist hann væl, men kennist kaldur.

Landnyrðingur er líka ráðligur sum norðan – teir koma uttan úr havi. Roynist tí ikki væl til terra. Tað kann koma eitt sindur av kava niður.

Landnyrðingur er ikki mjørkaætt, men tað kann vera heilt fitt av brimi.

Hellufólk siga um landnyrðing, at tá ið hann kom, varð hann liggjandi í 14 dagar.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan er eitt sindur mjúkari enn landnyrðingur, so hann líkist meiri eysturættini.

## Eystan

Eystan liggur beint inn á fjørðin og er ein sera góð ætt bæði á Hellunum og í Oyndarfirði.




Vindurin er besta ættin á Hellunum. Eingin vindur, ella næstan eingin vindur – heldur ikki í illveðri. Er nakað av vindi á Hellunum, so er illveður aðrastaðni, serliga í Norðoyggjum. Á Hellunum vita tey ikki av illveðri av eystri.

Gamalt var at siga á Hellunum, at ..... *lotar tað á Djúpunum á eystri, so er illveður á havinum norðanfyri* ....

Eysturættin kann ikki brúkast til terra. Lotið er ráðligt, og tað regnar ofta. Í lítlum vindi um veturin kann nógvur kavi leggjast. Eystan er ættin, har mesti kavin legst.

Eystan er mjørkaætt – kann leggja fult av mjørka á fjørðin og fjala bygdina. Mjørkin kann eisini vera tengdur av sjóvafallinum. Beint eftir kyrrindi – bæði eyst- og vestfalskyrrindi – kemur mjørkin inn á fjørðin.

Eystan er ikki brimætt. Kyrruætt.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan líkist eysturættini, men er ikki fult so góð ætt. Nokkso mjúkur, sum tey siga.

## Landsynningur

Landsynningur kemur omanav har frammi í bygdini, men meira fram við landi og inneftir í ytru bygdini.




Er nógvur vindur – illveður – er nógvur og ójavnur vindur har frammi í bygdini við hørðum hvirlum. Onkurtíð eru fólk tikin av fóti. Er gott veður kring landið, er eisini gott veður á Hellunum við lítlum vindi.

Ættin er ikki serliga turr, tað regnar ofta. Til terra er hon hálvturkandi (*ikki fullturkandi, sum útsynningur*). Fer at kava á landsynningi í lítlum vindi, verður stórkavi.

Mjørki kann gott koma á ættini, men bert oman í hálvan hagan. Hann liggur ikki og fyllir fjørðir, líkasum eystan.

Landsynningur er ikki brimætt á Hellunum, men tað kann súga tvørtur við landinum upp undir landsynning.

## Landsynningur sunnan

Landsynningur sunnan líkist suðurættini.

## Sunnan

Tá ið hann er sunnan, liggur hann omanav Fløtunum og Fuglafjarðarskarði.




Suðurættin líkist nokkso nógv landsynningi. Er nakað av vindi, er nógvur og ójavnur vindur á Hellunum. Hvirlurnar kunnu vera harðar. Er lítið av vindi kring landið sunnaneftir, er eisini gott veður á Hellunum við sól. Um summarið kunnu vera fleiri slíkir góðir dagar við vesturskini.

Sum terraætt er sunnan hampuliga góð. Sólin kemur seint undan á Hellunum, so døggin er ikki sett av fyrr enn seint fyrrapartin, men afturfyri er gott vesturskin.

Sunnan er mjørkaætt. Mest um summarið. Hann kemur omanav.

Einki brim er, tá ið hann er sunnan.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er sum sunnan. Hvirluvindur.

## Útsynningur

Útsynningur kemur javnur út eftir fjørðinum og er ein góð ætt á Hellunum.




Útsynningur er ein góð góðveðursætt á Hellunum, tó at hann altíð hevur eitt sindur av vindi við sær. Er nógvur vindur, er hann javnur, og glaður kunna koma út eftir fjørðinum. Fólk hava ikki ampa av ættini, tí vindurin er so javnur.

Útsynningur er besta terraætt á Hellunum. Tað fríska lotið kann taka ein part av hoygginum við sær, um trol ikki er lagt á turkiløgini – *útsynningurin hoyggjar fyri helvt, siga tey*. Útsynningur er ikki ein vát ætt, men er eitt brúgvalag við regni yvir Føroyum, regnar eisini á Hellunum. Eisini er ælaveður viðhvørt.

Í góðum veðri av útsynningi eru ofta skýggj á luftini, sum bera fyri sólina, tá ið hon kemur undan. Á vestri er luftin ofta klár við sól.

Útsynningur er mjørkaætt á Hellunum. Hann kann koma oman í hálvan hagan – ella eitt sindur longur oman enn tað. Sum á øðrum lágættum hevur tað verið so mikið av mjørka oman í røkurnar, at teir eru ikki slopnir á fjall. Legst skadda um Hjarðardalstind, kemur mjørki niður í røkurnar, og so verður tað meiri ráligt og óterri.

Útsynningur er ikki brimætt á Hellunum.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er sum vestan. Hvirluvindur. Hann kemur oman av Heltnini og slær í fjallið omanfyri, og so koma hvirlurnar omaneftir.

## Vestan

Vestan kemur oman av Heltnini og fer norðureftir, slær ímóti fjallinum undir Vaðhorni og fer yvirum.




Tá ið hann er vestan, er vindurin ójavnur. Hetta er ring illveðursætt saman við ættunum báðumegin við – t.e. útsynningi vestri og útnyrðngi vestri. Tá ið sagt verður frá illveðri, er vestan tann ættin, fólk á Hellunum ikki ynskja sær. Tað er ikki ofta vindskaðar á Hellunum, men viðhvørt hava skaðar verið í illveðri á vestri. Í nógvum vindi av vestri, koma harðar hvirlur oman av Heltnini. Í bygdini føla tey trýstið, áðrenn tær koma.

Í góðum veðri er vestan ein góð ætt. Tað er stilli, tað blikar á fjørðinum, og ofta er luftin klár við sól. Á útsynningi eru ofta skýggj á luftini, sum bera fyri sólina, tá ið hon kemur undan.

Vestan er ikki ein vát ætt, tó at tað regna viðhvørt. Vestan er góð terraætt.

Vestan er ikki ring mjørkaætt, men eitt sindur av mjørka kann vera viðhvørt. Ikki líka nógvur mjørki sum á útsynningi. Mjørkin kemur tá oman úr Skarðinum í Oyndarfirði og legst tvørtur um Fjørðin.

Vestan kann hava brim við sær viðhvørt.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum, tá ið ættin er vestan. Meira súgur er í sjónum enn á vestri.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur kemur úr Skarðinum í Oyndarfirði og er ójavnur á Hellunum.




Útnyrðingur hevur ójavnan vind við sær og hvirlur. Tað líkist nógv veðrinum í Oydnarfirði. Hann kann eisini leggjast við góðveðri.

Ta ið tað kemur til avfall, er útnyrðingur eit sindur frægari enn landnyrðingur. Landnyrðingurin liggur inn eftir fjørðinum og beint á bygdina, men útnyrðingur fer suðuryvir, og fyri ein stóran part fer avfallið framvið uttan at koma til bygdina. Útnyrðingurin kann leggja nógvan kava, serliga uppi á Heltnini.

Mjørki kann koma á útnyrðingi. Tá kemur hann úr Skarðinum.

Nógv brim er á útnyrðingi og á útnyrðingi norði. Tað kemur suður ígjøgnum Djúpini, rakar Kalsoynna og kemur yvirum. Brotini, sum raka Kalsoynna, eru so stór, at kemur kemur heilt upp til graskantin í bakkanum. Verri veðrið er, meiri er súgurin.

Í apríl mánað í 1932 var ódnarveður av útnyrðingi og av allarmesta brimi. Í ytru bygdini fór brimið niðan um neystini, og í teimum ovastu neystunum skolaðu bátarnir út – bæði teir, sum stóðu á lunnum og onkur, sum hekk undir bita. Tað breyt eisini niðan í hús, og onkunstaðni kom tað upp á benkurnar í roykstovuni. Ein hjallur fór heilur allur sum hann var, einki sást aftur til nakað av honum

ella tí, sum hevði verið í hjallinum. Ein stórur steinur, sum vigaði um 250 kg, varð slongdur upp úr fjøruni og niðan á bakkan. Fólk tosaðu um at rýma.

Í hesum sama illveðri fóru tvær sluppir, Laura og Immanuel, sum vóru á veg heim av Suðurlandinum við mann og mús, Fuglafjarðarboganir sjúnkaðu, og Lógvin í Saksun fyltist við sandi. Ódnin er umtalað sum ein 100ára ódn.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum, bæði tá ið ættin er norðan. Hann er ójavnari en útnyrðingur